


*Súni Swartz Jacobsen, stjóri og Bjarki Mohr, starvsfólkaleiðari uttanfyri Bank Nordik bygningin í Nuuk.*
Mynd Jan Müller

# Miðlahúsið fokus á »føroyska« fíggjarheimin í Nuuk

Føroyingar og føroyskar fyritøkur gerast ein alt meira virkin partur av støðugt vaksandi peninga- og fíggingarvirkseminum í grønlendska høvuðsstaðnum, sum er í støðugari menning. Meira enn 15.000 av teimum gott og væl 50.000 íbúgvunum í Grønlandi búgva og arbeiða í Nuuk, og býurin veksur fyri hvørt ár. Nútímans íbúðarblokkar stinga seg upp sum hundaland. Vaksandi námsvinnan og vónirnar til eina komandi oljuvinnu merkja eisini so smátt lívið í høvuðsstaðnum, tó at skjøtil enn bert er settur á. Miðlahúsið í Vágsbotni vitjaði í Nuuk herfyri og fer í miðlunum í næstum at seta fokus á nakað av hesum – umframt at lýsa tilgongdina til eina møguliga komandi grønlendska kolvetnisvinnu.

Farið verður m.a. inn á gólvið í nýggja Bank Nordik í býnum, har Jan Müller m.a. hittir Súna Swatrz Jacobsen, stjóra og Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara í bankanum umframt eitt av grønlendskum starvsfólkunum, Peter Hammiken.

Bert hundrað metrar frá nýggja Bank Nordik liggur hin bankin, Grønlandsbankin, sum eisini hevur føroyskar eigarar og starvsfólk. Har hitta vit Bjarta Nolsøe úr Vági, sum er vinnulívskundastjóri í bankanum. Eisini práta vit við Gunnar í Liða, forstjóra í Tryggingarfelagnum Føroyar. Hann er nevndarlimur í bankanum og er á nevndarfundi um somu tíð, sum stjórin í Bank Nordik vitjar.

Ein kann av røttum siga, at føroyingar seta síni fingramerki á banka- og fíggingarvirksemið í grønlendska høvuðsstaðnum og harvið eisini menningina av Grønlandi.

Nakað av hesum verður at hoyra í morgunsendingini á Rás2 mánamorgun millum klokkan 9 og 11. Tað er Jan Müller, sum stendur fyri sendingini. Í enn eini sending, sum fer at koma seinni, verður vitjað á skrivstovuni hjá Útnorðurgrunninum, har lorvíkingurin Sverre Hansen býtir út milliónir til verkætlanir í Útnorðri.



*Bjarti Nolsøe, vinnukundastjóri í Grønlandsbankanum.*
Mynd Jan Müller




*Gunnar í Liða, nevndarlimur í Grønlandsbankanum.*
Mynd Jan Müller



*Nuuk er í støðugum vøkstri, her nakrir av nýggju íbúðarblokkunum. Tað setir krøv til fíggingarheimin.*
Mynd Jan Müller